Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald
(Meirvirðisgjaldslógin)
(Grønar hitaloysnir og talgildir fjølmiðlar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 22. mai 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 3 d, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Tey, sum gera íløgur í góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum og bygningum, kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið part av meirvirðisgjaldinum av íløgukostnaðinum til hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn. Í 2024 verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2025 verða 75% av meirvirðisgjaldinum endurgoldin, í 2026 verða 50% av meirvirðisgjaldinum endurgoldin, og í 2027 verða 25% av meirvirðisgjaldinum endurgoldin. Í 2028 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið. Fyri at koma undir endurgjaldsstigið eitt ávíst ár, er tað ein treyt, at arbeiðið er gjørt og goldið tað árið."

2. Í § 3 d, stk. 3 verður aftan á nr. 1 sum nýtt nr. sett:
"2) móttøkuváttan frá IRF ella Kommunalu Brennistøðini um burturbeining av oljufýrsútbúnaði fylgja við umsóknini, tá talan er um uppsetan av hitapumpuskipan í hús og bygningar, sum áður hava brúkt oljufýrsútbúnað til upphiting."
Nr. 2-5 verða eftir hetta nr. 3-6.

3. Í § 3 d, stk. 3, nr. 3 verður "31. desember 2025" broytt til: "31. desember 2027".

4. Í § 3 d, stk. 3, nr. 4 verður "31. mars 2026" broytt til: "31. mars 2028".

5. § 12, stk. 1, litra h verður orðað soleiðis:
"h) Søla av tíðindabløðum, undir hesum talgildum tíðidabløðum, og prenting fyri tíðindabløð."

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. § 1, nr. 1-4 hava virknað frá 1. januar 2024.
Stk. 3. § 1, nr. 5 hevur virknað frá 1. ársfjórðingi 2024.

§ 3

§ 1, nr. 2 er einans galdandi fyri arbeiði gjørt í 2024 ella seinni.

Samtykt á Løgtingi hin 27. februar 2024 við 22-0-7 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 4. mars 2024

stjóri

LM-055/2023